## Gevast við at stuðla Labour

Tað kemur nú bretska Arbeiðaraflokkinum aftur um brekku, at fleiri politikarar hjá flokkinum hava verið dekan ov skjótir at brúka almennar pengar, og at teir í fleiri førum hava tambað lógirnar í meira lagi. Í hvussu er hava nakrir av teimum størstu figgjarligu stuðlunum hjá flokkinum boðað frá, at teir umhugsa at gevast við at veita flokkinum fíggjarligan stuðul. Blaðið The Guardian, sum hevur avdúkað ta heldur óhepnu penganýtsluna hjá politikarunum, sigur frá óalmennum keldum, at Arbeiðaraflokkurin kann missa fleiri milliónir pund í stuðuli, um stuðulsveitarnir gera álvara av at strika stuðulin.



## Skutu eftir Karzai yngra

Ein trygdarmaður doyði, tá ókendi menn skutu eftir bilinum hjá Ahmed Wali Karzai, sum er yngri bróður afghanska forsetan, Hamid Karzai. Ahmed, sum er guvernørur í Kandahar, segði á tíðindafundi aftan á tilburðin, at bilafylgi hansara bleiv álopið á motorvegnum uttan fyri høvuðsstaðin Kabul. Tað er ikki greitt, hví guvernørurin bleiv álopin, men vesturlendskir fjølmiðlar vilja vera við, at hann er uppi í handli við rúsevnum. Ein annar bróður forsetans, Mahmoud Karzai, hevur sambært vesturlendskum fjølmiðlum fingið nógvar pengar burtur úr rúsevnahandli, skrivar Reuters.

# Eftir kreppu kemur k

**Sambært Helle og Anders Knutsen, sum hava havt leiðandi postar í Bang og Olufsen, er kreppan um at venda, og tá marknaðurin er komin fyri seg aftur verður lágprísur ein farin tíð. – Tað er kvalitetur fyritøkur skulu fokusera uppá, tí koyr burtur mentanin er um at fara, siga tey**

VINNULÍV
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Flestur stóru slipsanálirnar í Føroyum vóru savnaðar í Norðurlandahúsinum fríggjadagin, tá Tryggingarfelagið Føroyar skipaði fyri fyrilestrum fyri úrvaldum stórum kundum hjá fyritøkuni, og tá fyrsti fyrilesturin var av, høvdu allar hesar nálir fingið at vita, at tá kreppan vendir verður tað kvalitetur og ikki bara prísur, sum setir dagsskránna.

Ætlanin við tiltakinum, var, sambært Tryggingini, at geva stóru føroysku fyritøkunum íblástur, nú kreppa herjar og inntøkumetingarnar hjá landinum vísa, at tað er sera torført at lokka pening úr lummunum hjá fólki.



*Ruskdungarnir í vesturheiminum minni og minni, og sambært Helle og Anders Knutsen, donskum vinnulívsfólkum, fer hetta at halda fram, tí koyr burtur mentanin er á veg burtur. Tí eru góðskuvørur vegurin fram*

### Poesi ella prísur

Hóast tað helst mest var fyri at lýsa fyri bókini, pris eller poesi, sum Helle og Anders Knudsen hava skrivað saman, at tey bæði vóru í Føroyum, so góvu tey eitt boð uppá, hvussu fyritøkur, sum ikki veruliga hava hugsað um sín samleika, kunnu gera, fyri at sleppa sum frægast burturúr hesi kreppuni.

– Vit gera øll val alla tíðina, men hevur tú eina fyritøku, sum bæði vil vera best í prísi og kvaliteti, so mást tú hugsa teg væl um. Tí tað er ikki ein gongd leið, tað ber ikki til at vera best til bæði. Men tú kanst velja, at vera best í prísi, og tær fyritøkurnar klára seg væl fyri tíðina, tí fólk spara har tey kunnu í hesum døgum, men tú skalt eisini vita, at kappast tú um prís, so skalt tú rokna við, at hevur tú ikki lægstu prísirnar alla tíðina, so velja fólk ein annan veitara. Hinvegin kanst tú velja at kappast um kvalitet ella poesi. Tað gevur ikki so nógv í løtuni, men vit síggja, at »throwawayism«, blaka burtur mentanin, er doyggjandi, og tí kunnu vit rokna við, at kvalitetur og haldbari eru vegurin fram, heldur Anders Knutsen.

### Keypa virðir

Sambært teimum báðum Knutsen, er størsti munurin á keyparum av kvaliteti og á teimum, ið keypa fyri prís, so er munurin, at tá vit keypa kvalitet, so keypa vit eina vøru, umframt alla søguna aftanfyri, hóast tað í stóran mun er sami keyparin til ymiskar tíðir, tí vit øll velja ímillum prís og kvalitet alla tíðina, men tá vit keypa fyri prísin, so velja vit altíð tað bíligasta. Tá vit keypa kvalitet, so keypa vit øll virðini, sum vøran stendur fyri.

– Tá tú keypir okkurt, sum tú veruliga hevur spart upp til, so er tað nakað tú keypir fyri at gleða teg sjálvan. Tú keypir alla søguna aftanfyri, og ikki bara eina vøru, er Helle Knutsen sannførd um.

Tí halda tey bæði, at fyrsta uppgávan hjá eini fyritøku, er at gera produktir, sum veruliga eru góð, og síðani er uppgávan at greiða øllum heiminum frá, at tað veruliga eru bestu produktini.